# B71 flutti ikki upp

*Tað eydnaðist væl og virðiliga hjá leirvíkingum at varðveita plássið í næstbestu deildini*

*Tað er nú greitt, at LÍF sleppur at halda fram í næstbestu deildini, eftir at teir í tveimum umførum vunnu greiðan sigur á næstbestu sandoyingunum*




Royn verður einasta liðið, sum flytir úr 2. og niður í 3. deild, og Skáli verður einasta liðið, sum flytir úr 3. og upp í 2. deild.

Tvey tey síðstu vikuskiftini hava sandoyingar og leirvíkingar verið noyddir at spælt fótbólt, meðan teir samstundis hava hugsað um fjallið.

Longu eftir fyrra dystin, sum var á Sandi næstsíðsta vikuskifti, bendi alt á, at LÍF fer at halda fram í 2. deild, og at teir í B71 kunnu heingja bronsukrónurnar á naglan sum minni um eitt gott kappingarár í 3. deild. Og í vikuskiftinum vórðu ábendingarnar so rudduliga gjørdar til veruleika.

Á Sandi vann LÍF 4–0, eftir at munurin bara hevði verið eitt mál inntil tað restaðu 20 minuttir. Á heimavøllinum í Leirvík vunnu leirvíkingar ikki minni enn 10–0, eftir at teir í hálvleikinum høvdu verið frammanfyri 4–0. Tíverri eydnaðist tað okkum ikki at fáa fatur á dómaraseðlinum, men vit hava frætt, at pólverjarni báðir skoraðu sjey mál tilsaman. Tomek Resel skoraði fimm mál, og Mirek Gil skoraði tvey mál.

Hinum málunum tóku leirvíkingar sjálvir sær av. Ein av ungu spælarunum, Fróði Joensen, skoraði tvey, og fyrsta málið skoraði Jonhard Høgnesen.

JH

**30. september**
B71–LÍF 0–4 (0–1)
0–1: Kaj Eli Olsen 18.
0–2: Mirek Gil 79.
0–3: Kaj Eli Olsen 82.
0–4: Jonhard Høgnesen 90.

**14. oktober**
LÍF–B71 10–0 (4–0)
Tomek Resel (5), Mirek Gil (2), Fróði Joensen (2) og Jonhard Høgnesen (1)

# FSV flutti niður

*Klaksvíkingar fluttu upp, tí teir skoraðu fleiri mál á útivølli enn vágamenninir gjørdu*

Komandi ár verður næstbesta liðið hjá FS Vágum í 4. deild. Hetta gjørdist greitt mikukvøldið. Tá var FSV í Klaksvík og spældi seinna dystin um eitt pláss í 3. deild. Klaksvíkingar høvdu frammanundan vunnið 4–3 í Vágum. Og so hjálpti tað einki, at FSV megnaði at vinna 2–1 í Klaksvík. Liðini stóðu jøvn í stigum og málum. Reglurnar um upp– og niðurflytingardystum siga, at í sovornum førum er avgerandi, hvat liðið hevur skorað fleiri mál á útivølli.

Niðurflytingin boðar frá, at tað hevur gingið skjótt skeiva vegin við fótbóltinum í Vágum. Í 1995 var FSV fyri fyrstu ferð í 1. deild. Umframt at hava lið í bestu deildini, so hevði FSV í 1995 eitt lið í 2. deild.

Sørvingar vóru ikki við í FSV fyrstu árini. Besta liðið hjá sørvingum var í 2. deild í 1995. Tað vil við øðrum orðum siga, at í 1995 høvdu Vágarnar eitt lið í 1. deild og tey lið í 2. deild. Í 2001 verður eitt vágalið í 1. deild og einki í 2. ella 3. deild.

KÍ endaði aftast í 3. deild í ár og flutti tíski beinleiðis niður. GÍ vann 4. deild og flutti beinleiðis upp í 3. deild. Í finaluni vann GÍ á KÍ. Liðið hjá KÍ í 4. deild kvalifiseraði seg at spæla ímóti næstaftasta liðnum í 3. deild. Tað var FS Vágar.

Sambært Norðlýsið ætla teir, sum í ár hava mannað 4. deildarliðið hjá KÍ, sær ikki at spæla í 3. deild komandi ár.

3. deild spælir vanliga klokkan 17 sunnudag. Tað líkar familjumonnum nógv betri at spæla leygardagar enn sunnudagar seinnapart. Tí fara 4. deildarspælararnir hjá KÍ í ár at halda fram í 4. deild. Spurningurin er so, um klaksvíkingar komandi ár fara at fáa skil á 3. deildarliðnum, sum teir tey seinnu árini meiri ella minni hava verið í neyð av.

JH

**30. september**
FSVágar–KÍ 3–4 (1–2)
1–0: Jach Johansen 15.
1–1: Kristian Suni Høgnesen 25
1–2: Hans Michael Christiansen 30.
1–3: Kristian Andreasen 55.
2–3: Hilmar Hansen 73.
2–4: Jonhard Høgnesen 77.
3–4: Herning Simonsen 86.

**11. oktober**
KÍ–FS Vágar 1–2 (1–0)
1–0: Karl Marius Poulsen 30.
1–1: Andreas Jensen 70.
1–2: Hilmar Hansen 75.




# Skipanin komin

*Flogbóltskappingin fór í gongd um vikuskiftið, og tað merkir eisini, at kappingarskipanin nú er at fáa*

Jákup Mørk

Skal landsumfatandi kapping gerast, er aloftast neyðugt við eini skipan av einhvørjum slag.

Hetta er sjálvandi eisini galdandi fyri flogbóltskappingina, sum komandi mánaðirnar fer at fara fram um landið.

**Hentleikar**

Í skipanini er sjálvandi yvirlit yvir, nær og hvar ymsu dystirnir verða leiktir.

Til at lætta um hjá teimum, sum skulu ferðast til dystir, eru ferðaætlanirnar hjá Strandferðsluni og Bygdaleiðum prentaðar í skipanina.

Umframt at dystaryvirlit fyri einstøku deildirnar er prentað, er eins og vanligt eisini prentað eitt dagayvirlit, har til ber at síggja, allar landskappingardystirnar, sum verða leiktir ávísan leikdag.

Annars eru sjálvandi eisini prentaðar kappingarreglur fyri lands- og steypakapping, umframt at yvirlit yvir ymsu kappingarnar, sum feløgini sjálv skipa fyri, er prentað.

Skipanin fæst í sølubúðum kring landið.

Sosialurin fer sjálvandi eins og undanfarin ár at fylgja við, hvussu hevur gingist í ymsu dystunum.

Vegna tekniskar trupulleikar bar hetta okkum tó ikki til í da, men verður flogbólturin hesa vikuna ístaðin umrøddur í blaðnum í morgin.

**Støðan, 1. deild kvinnur**

| | | dystir | v | - | j | - | t | vunnin mál | tapt mál | málmunur | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | Stjørnan | 3 | 2 | - | 1 | - | 0 | 81 | 72 | 9 | 5 |
| 2 | VÍF | 2 | 1 | - | 1 | - | 0 | 50 | 39 | 11 | 3 |
| 3 | VB | 2 | 1 | - | 0 | - | 1 | 62 | 39 | 23 | 2 |
| 4 | Neistin | 2 | 1 | - | 0 | - | 1 | 46 | 46 | 0 | 2 |
| 5 | Sóljan | 3 | 1 | - | 0 | - | 2 | 70 | 70 | 0 | 2 |
| 6 | Kyndil | 2 | 1 | - | 0 | - | 1 | 40 | 50 | -10 | 2 |
| 7 | Tjaldur | 2 | 0 | - | 0 | - | 2 | 28 | 61 | -33 | 0 |

**Støðan, 1. deild menn**

| | | dystir | v | - | j | - | t | vunnin mál | tapt mál | málmunur | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | VÍF | 3 | 3 | - | 0 | - | 0 | 89 | 74 | 15 | 6 |
| 2 | StÍF | 3 | 2 | - | 0 | - | 1 | 103 | 69 | 34 | 4 |
| 3 | Neistin | 2 | 2 | - | 0 | - | 0 | 55 | 45 | 10 | 4 |
| 4 | Kyndil | 3 | 1 | - | 0 | - | 2 | 88 | 82 | 6 | 2 |
| 5 | H71 | 2 | 1 | - | 0 | - | 1 | 59 | 60 | -1 | 2 |
| 6 | KÍF | 2 | 0 | - | 0 | - | 2 | 43 | 58 | -15 | 0 |
| 7 | Tjaldur | 3 | 0 | - | 0 | - | 3 | 67 | 116 | -49 | 0 |



Original
bosal
Útstoyt



ES
p/f Esmar Simonsen
Kambsdalur
FR-530 Fuglafjør›ur
Tlf. 444405
Fax444629

ELEKTRON

Lei›ari til Systemdeildina

Høvu›suppgávan hjá systemdeildini, er at menna og vi›líkahalda tekniska platformin hjá Elektron og kundum felagsins. Harumframt luttekur systemdeildin í arbei›inum at loysa ymiskar tekniskar trupulleikar í koma í gerandisdegnum.

Tekniski platformurin er samansettur av trimum høvu›spørtum:

- Einum stórtelduumhvøri, sum í høvu›sheitinum umfatar tvær rakstrarmi›stø›ir, vi› hvør sínum høvu›sambætara og hvør sínari diskskipan. Diskskipaninar spegla hvørja a›ra og samskiftisútbúna›urin er settur solei›is upp, at rakstrarumhvørvi› kann skifta millum rakstrarmi›stø›irnar.
- Eitt ví›økisnet, sum fyri tí›ina ver›ur umlagt til eitt rutaragrunda› net.
- Lokalur útbúna›ur hjá Elektron og kundum felagsins, vi› NT ambætarum, arbei›sstø›um og ymiskum útbúna›i.

Mesta arbei›i› í deildini ver›ur framt í smærri og størri verkætlanum, í samstarvi vi› hinar deildirnar á Elektron og vi› kundarnar.

Systemlei›arin hevur ábyrgdina av systemdeildini, har 7 fólk fyri tí›ina starvast. Í hesum sambandi hevur systemlei›arin almennu ábyrgdina av øllum infrastrukturverkætlanum, herímillum samstarvinum vi› inn- og útlendskar undirveitarar á økinum.

Talan er um eitt sera spennandi og ábyrgdarfult starv. Systemlei›arin skal alsamt javnviga kravi› um at fáa framt systemverkætlanir innan avtala›ar tí›arkarmar vi› tørvin fyri einum vælvirkandi, stø›ugum og tryggum rakstrarumhvørvi.

Umsøkjarar vi› hollari tekniskari útbúgving og lei›sluroyndum hava fyrimun.

Um tú vil vita meira
Ert tú vælkomin at seta teg í samband vi› Niels Chr. Nolsøe, stjóra, á telefon 31 45 05 ella á telduposti ncn@elektron.fo.
Umsøknir skulu stílast til Niels Chr. Nolsøe, P/F Elektron, Staravegur 9, 100 Tórshavn.

P/F Elektron er edv-veitari til almennar stovnar, peningastovnar, tryggingar og grunnar. Vit veita nærum allar tænastur innan edv til kundar okkara, herímillum kanningar av ymiskum tekniskum og handilsligum vi›urskiftum, skipanarmenning og rakstur av edv-skipanum.

Størstu partaeigarirnir eru Føroya Banki, Føroya Sparikassi og Føroya Landsst‡ri.

PF ELEKTRON
STARAVEGUR 9 · P.O. BOX 219
FO - 110 TÓRSHAVN
TEL.: +298 314505 - FAX: +298 316384
e-mail: info@elektron.fo

stephanssons hús

Føroya størsta úrval av
PAKKITILFARI
úr karton, bylgjupapp og plast innan øll vinnuøkir

Vit útvega eisini:
* Plastbakkar
* Pakkibond, tape
* Merkir, etikettir
* Knívar
* Kitlar, húgvur, handskar, svintur o.l.
* Ymisk tól til ídnaðin
* Reingerðisevnir
* Tilsetningsevnir
* Plattar
* Ráðgeving í tilevning av pakkitilfari

...sjálvandi til besta prísin!!

FARPACK
Staravegur 5, P.O. Box 3099
FO-110 Tórshavn
Telefon +298 35 30 00
Fax +298 35 30 10
E-mail: farpack@farpack.com

Nýggjar
TANNPROTESUR
Broytingar og umvælingar av gomlum protesum
Kliniskur tannteknikari
BERGUR
Á REYNATRØÐ
Børkuvegur, 620 Runavík
Tlf. 448480
Opið er mánadag-fríggjadag frá kl. 9-16



Skorsteins-sóparin
er við til at halda umhvørvið reint
Jimex Brenniovnar
Isokern Skorsteinsbjálving
Isokern Skorsteinselementir
Lúkur - Fuglaristir
Ventilar - Roykhattar
Andrass á Krossbrekku
Skúlagerði - 430 Hvalvík
tel +298 422456
far+ 298 286458
fax + 298 422458
andrass@post.olivant.fo
heima.olivant.fo/-andrass

Reyði krossur Føroya
Sorgarlinjan hjá Reyða Krossi Føroya svarar mánad., mikud. og fríggjad. frá kl. 19⁰⁰ til 21⁰⁰
☎ 212380

Vit rudda upp
Øll vøra ÷50%




Barnaklæðir til gentur og dreingir 0-16 ár



BAMSAN
v/ Charlotte Ellendersen
N. Finsensgøta 25 • 100 Tórshavn
Tel. 32 11 11

Sosialurin - 311820

Norðurlandahúsið í Føroyum
Sí SVF tekstvarp s. 650

Sildagoymslan
NÚ HAVA VIT AFTUR SILD
Salt- og kryddsildafløk – 5 kg
Avgreitt frá goymslu og sent heim í Havn og við Strandferðsluni
Sildagoymslan · Tlf. 312355 kl. 10-16